FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Føroya Kommunufelag
Frammi í Gerði 1
340 Kvívík

Argir, tann 26. apríl 2011

**Avtala millum Føroya Kommunufelag (FKF) og Fíggjarmálaráðið, um lækking av kommunuskattinum í samband við pensjónsnýskipanina**

Í samband við Pensjónsnýskipanina sum er til viðgerðar í Løgtinginum, tekur FKF undir við, at kommunuskatturin hjá øllum kommunum kann lækkast við 1,25% í 2012, um nýskipanin verður samtykt av Løgtinginum í 2011. Fyri Tórshavnar kommunu kann skatturin tó bert lækkast 1% í 2012.

Um ein ella fleiri kommunur gera av, ikki at lækka skattaprosentið í 2012 í samsvar við omanfyri nevnda, er hetta at meta sum ein skattahækking, sum er grundað á aðrar raðfestingar hjá kommununi.

Hjálagt eru útrokningar, har víst er tann samlaða ávirkanin í 2012 av pensjónsnýskipanini á hvørja einstaka kommunu, íroknað skattalækking.

Henda avtala fevnir ikki um ásetingina av kommuskattinum eftir 2012. Skattalækkingin sambært hesa avtalu er eitt minstamark, sum ikki forðar fyri at lække kommunuskattin enn meira.

Í løgtingsmáli nr. 167/2010: *"Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt"* er ásett eitt kommunaskattahámark fyri pensjónistar. Sambært hetta lógaruppskot, verða kommununar kompenseraðar av landinum fyri skattamissin, sum stendst av kommunuskattahámarkinum.

Sum úrslit fyri hesa avtalu, verður samsvarandi avtala send til hvørja einstaka kommunu at undirskriva.

_________, tann / - 2011

_________, tann / - 2011

**Asbjørn Djurhuus**
formaður FKF

**Aksel V. Johannesen**
landsstýrismaður

KVÍGGJARTÚN 1 • POSTSMOGA 2039 • FO-165 ARGIR
TELEFON: + 298 35 20 20 • TELEFAX: + 298 35 20 25 • E-MAIL: FMR@FMR.FO